## Tryggja innkoyringina til Havnar

Umframt at festa skeltir niður á vegbreytina, verða eisini onnur tiltøk gjørd fyri at tryggja sjálva innkoyringina til Havnar mest møguliga. Miðjaðarin á vegnum verður breiðkaður fyri at skilja ta nógvu ferðsluna meira sundur, ein ferðgái, sum vísir tína ferð, verður settur upp í næstum og oyggjar eru gjørdar við gonguteigin við Manbrekku, sum umframt at gera tað tryggari hjá fólki at fara yvir um vegin eisini gera tað møguligt hjá fólki at steðga á vegmiðjuni.



# Føroya Kolvetni borar við markið




*Tað er flaggskipið í oljuboriflotanum, Stena Carron, sum nú borar Tornadobrunnin*




*Kortið vísir Tornadoleiðina heilt har suðuri og beint við markið. Boringin er sera áhugaverd, tí Cambo, sum er eitt fund, liggur skamt har frá, og stutt er eisini til Anne Marie leiðina á føroyskum øki, sum verður borað næsta ár*

**Herfyri fann oljufelagið Faroe Petroleum saman við DONG gass vestan fyri Hetland. Nú eru somu feløg farin at bora tætt upp at føroyska markinum, niðri í tí sokallaða ”Gullhorninum”**

OLJUBORING

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Faroe Petroleum boðar í dag frá, at felagið er farið undir at bora á Tornado leitimiðinum, ið liggur 130 km vestan fyri Hetlandsoyggjarnar, og beint við føroyska sjómarkið. Felagið eigur 7.5% av loyvinum, eftir at tað varð lagt saman við loyvinum við síðurnar av.

Tornado er eitt stórt oljuleitimið á 1100 metra havdýpi. Tornado liggur nær við óútbygdu Suilven oljukelduna, og kann bindast í Schiehallion oljuframleiðslueindini.

Faroe Petroleum fekk tillutað sín part av Tornado í sambandi við 22. útbjóðingarumfar í Bretlandi, og í mai 2007 seldi felagið helvtina av sínum 20% til Idemitsu E&P UK Limited, sum afturfyri rindar part av borikostnaðinum hjá Faroe Petroleum.

Eftir handilin átti Faroe 10% í loyvi P1190, men av tí at oljumiðið eisini liggur inni á loyvi P1262, sum liggur við síðurnar av, varð avtalað við P1262 loyvishavararnar, at borikostnaðurin og leitimiðið skuldi býtast eftir lutfallinum 75:25 yvir bæði loyvini. Sostatt eigur Faroe Petroleum 7.5% av Tornado leitimiðinum.

OMV (UK) Ltd er fyristøðufelag á loyvinum. Boriskipið Stena Carron borar brunnin, sum væntandi fer at taka 24 dagar at bora.

Tornado er annar av fimm brunnum á Atlantsmótinum hjá Faroe Petroleum. Gass varð funnið á Glenlivet, tann fyrsti av teimum fimm brunnunum, har metingarboringar verða gjørdar í løtuni. Tá liðugt er at bora Tornado, heldur boriætlanin á Atlantsmótinum fram við Anne Marie oljuleitimiðinum á føroyskum øki og Cardhu og Lagavulin oljumleitimiðunum á bretskum øki. Hesir tríggir brunnarnir verða væntandi boraðir í 2010.

Tað er greitt, at eisini føroyskir oljumyndugleikar fylgja væl við Tornadoboringini, hóast hon er í bretskum øki. Hon liggur so tætt upp at føroyska markinum, at eitt olju ella gassfund her vil alt fyri eitt skapa áhuga fyri leitiøkjum føroysku megin markið eisini.